## Lovar minni mannfall

Á einum tíðindafundi í afghanska høvuðsstaðnum Kabul í morgun segði nýggi NATO-aðalskrivarin, Anders Fogh Rasmussen, at hann fer at virka fyri, at NATO skal missa so fáar hermenn sum yvirhøvur gjørligt í Afghanistan. Hann legði afturat, at í einum kríggi slepst ikki undan, at sivilfólk lata lív, men hann lovaði, at tað talið verður minni í framtíðini. Sjálvt um tað hevur verið sera ófriðarligt í Afghanistan tann seinasta mánaðin við fleiri atsóknum, heldur NATO fast um, at afghanar skulu yvirtaka trygdina í landinum. Tað endurtók Anders Fogh Rasmussen eisini á tíðindafundinum í morgun.



## Ikki fleiri búsetingar

Amerikanski Miðeystur-samráðingarmaðurin George Mitchell hevur latið ísraelsku stjórnini eitt uppskot um, at landið skal útseta alla nýbygging í teimum hersettu økjunum í eitt ár. George Mitchell sigur, at útsetanin skal vísa palestinum og teimum arabisku londunum, at Ísrael er til reiðar at samráðast fyri at fáa enda á stríðnum við palestinar. Amerikanski samráðingarmaðurin hevur lagt uppskotið fyri Benjamin Netanyahu, forsætisráðharra og Ehud Barak, verjumálaráðharra, og sum skilst hava teir ikki víst tí frá sær, skrivar ísraelska blaðið Haaretz.

# Nøkur trø máttu lúta

**Føroya størsta ask í urtagarðinum hjá ALS yvirlivir, og stjórin Ernst Jacobsen vónar inniliga, at elsta elmin eisini hórar undan**

URTAGARÐUR

Randi Jacobsen
randi@sosialurin
Myndir: Jens Kristian Vang



*Tá ið sjúku roynitrøini vóru feld, sóu urtagarðsfólkini, at avgerðin var røtt. Trøini vóru holað út, og tey kundu tað sama verið dottin niður*

Húsið hjá Arbeiðsloysisskipanini stendur við Tinghúsvegnum í einum meira enn 100 ára gomlum urtagarði.

Tá ið Arbeiðsloysisskipanin fyri nøkrum døgum síðan fekk fólk at meta um trøini, vóru tað fólk, sum hildu, at nú ruku øll trøini.

Men soleiðis er als ikki.

- Vit sóu, at har vóru fleiri sjúk trø og settu okkm í samband við fyritøkuna Vøkstur fyri at fáa eina meting av, hvørji trø kundu varðveitast, sigur Ernst Jacobsen, stjóri á ALS.

Býargartnarin kom eisini uppí, og hann bønaði um, at teir royndu at varðveita gomlu elmina, sum er líka gomul sum aksin. Og tað er gjørt.

Har eru eisini nøkur vøkur ahorntrø, sum hava tað avbera gott.

Men roynitrøini kundu ikki bjargast, tí tey trøini liva lítið longur enn í 100 ár. Tey vóru holut innan, og tað er bara takkað verið, at so veðurgott er við Tinghúsvegin, at tey ikki eru dottin og møguliga gjørt skaða.



*Øll trø, sum kunnu varðveitast, fáa loyvi at standa. Urtagarðurin fer at verða nógv ljósari*

Gartnarin Annleyg Patursson hevur eisini ráðgivið um urtagarðin og planturnar.

- Urtagarðurin var ikki friðaður, men sjálvandi hava vit virðing fyri urtagarinum og gomlu trøini, sum tey flestu kunnu varðveitast.

Ernst Jacobsen væntar, at urtagarðurin fer at verða væl vakrari, tá ið Vøkstur er liðugur við arbeiði sítt. Nú nøkur trø eru kappað niður, og onnur eru skorin nakað niður fyri at bjarga teimum, verður væl ljósari, og tað er tí ikki óhugsandi, at okkurt annað verður plantað aftrat.

### Verður ljósari

- Her hevur verið so myrkt, at næstan bara trøllakampar, hvannir og onkrar botnplantur hava yvirlivað.

Ernst Jacobsen er fegin um, at gamli elmurin verður bjargaður. Frammanundan hevði hann smáar vónir, tí tað dryppaði nakað kleiggj úr trænum. Men nú er elmurin skorin nakað niður.

Greinarnar á onkrum av trøunum vaska langt tinn í garðin hjá grannanum. Ernst Jacobsen hevur spurt grannarnar, hvat teri siga, og grannarnir hava einki ímóti hesum greimum, tí trøini eru so vøkur.

- Eg vænti, at urtagarðurin verður nógv vakrari nú, sigur Ernst Jacobsen.

## Steintór hart revsaður

**Føroya rættur staðfesti í dag avgeðina hjá Fiskiveiðieftirlitinum um, at trolarin Steintór skal miassa fiskiloyvi í fýra vikur**

ÓLÓGLIGUR FISKISKAPUR

Randi Jacobsen
randi@sosialurin.fo

Tað var ein dyggur smeitur fyri rolarin Steintór, at hann 24. juli varð tikin fyri at trola við einum posa við smærri meskum inni í trolposanum.

Føroya rættur hevur í dag gjørt úrskurð í málinum og gevur Fiskiveiðieftirlitinum fult viðhald: Steintór skal missa fiskirættindini í fýra vikur, frá 24. Juli klokkan 18 at rokna.

Rætturin helduur ikki, at nøkur umbering fisnt, og rætturin viðmerkir eisini, at ólógligi fiskiskapurin var lagdur til rættis soleiðis, at skjótt var at sleppa av við posan og harvið gera arbeiðið hjá Fiskiveiðieftirlitinumtorførari. Og tað svíða fiskastovnarnir fyri.

Reiðariið hjá Steintóri hevur møguleikan at kæra úrskutðin hjá Føroya rætti til Eystara landsrætt.

# Landar í Leirvík

**Trolbáturin Sigrun, sum Tjaldrið tók mánadagin fyri at trola á stongdari leið, hevur í dag landað í Leirvík**

ÓLÓGLIGUR FISKISKAPUR

Randi Jacobsen
randi@sosialurin.fo

Tá ið trolbáturin Sigrun úr Saltangará varð tikin mánadagin, kravdu ákæruvaldið eina millión krónur í trygd, fyri at báturin kundi loysa aftur.

Reiðaríið hevði í dag enn ikki veitt hesa trygd, og tað er einki óvanligt í tí, at hetta kann taka nakrar dagar.

Men kortini fekk Sigrun loyvi at loysa og sigla til Leirvíkar fyri at landa fiskin. Ákæruvaldið hevði fingið at vita, at júst í dag var besti dagur at landa, og í Leirvík.

Har verður Sigrun so liggjandi, til trygdin er veitt.

Tjaldrið tók Sigrun mánadagin fyri at trola innan fyri 12 fjórðingar, har stongt er fyri troling alt árið. Ákæruvaldið hevur illgruna um, at báturin eisini hevur trolað á øðrum stongdum leiðum.

